# Kafékvøld á Margarinfabrikkini



Manningin á Speaker

*Tíðindaskriv*

Hóskvøldið 12. februar kl. 20 verður aftur eitt av teimum vælumtøktu kafékvøldunum á Margarinfabrikkini, har livandi tónleikur fyri tað yngra ættarliðið verður at hoyra.

Hesaferð verður tað tann annars rokkandi bólkurin Speaker, sum spælir eina akkustiska útgávu av teirra annars vælsvingandi melodiøsa rokktónleiki. Speaker eru annars saman við 48 Pages (áður Monkey Mongolia) í ferð við at spæla seg heitar til Íslandstúrin í apríl.

Annars eru boð eftir báðum bólkunum. Teir spæla fyri Grót í Gøtu leygarkvøldið 14. februar saman við Frostbit. Og 20. februar á Margarinfabrikkini saman við Sic.

Tað er ikki fyrstu ferð, at kafékvøld er á Margarinfabrikkini. Men sum ein liður í virkseminum til tess at fáa tiltøk, sum ung kunnu fara til, er hetta eitt afturvendandi tiltak, har bólkar sum m.a. Páll Finnur Páll og Týr hava spælt fyri ungdómum í einum bæði royk- og rúsfríum umhvørvi.

Margarinfabrikkin er kanska tað einasta realistiska tónlistarliga alternativið í landinum.

Tiltakið er ókeypis.




…og so eisini plakat

# Jarðfrøðingar úr øllum heiminum til Føroya

**Stór ráðstevna í Norðurlandahúsinum í mai, har serfrøðingar fara at seta kikaran á basaltið við Føroyar og harvið geva sítt íkast til at loysa basaltgáturnar. Ráðstevnan er eisini liður í at marknaðarføra føroyska økið**

UNDIRGRUND
*Jan Müller*



*Sigurd í Jákupsstovu, stjóri á Jarðfrøðissavninum setir stórar vónir til ráðstevnuna í mai*

Í døgunum 4. og 5. mai verður stór altjóða jarðfrøðilig ráðstevna í Havn, har flieir av heimsins leiðandi serfrøðingum innan basalt fara at halda fyrilestrar. Tað er Jarðfrøðissavnið, sum skipar fyri hesi fyrstu ráðstevnuni á slíkum slag í Føroyum. Tað er eisini fyrstu ferð yvirhøvur, at ráðstevna verður fyriskipað, har tað í heilar tveir dagar bara verður sett fokus á eitt evni, í hesum førinum basalt og her serstakliga okkara egna basalt.

Sigurd í Jákupsstovu, leiðari av Jarðfrøðissavninum sigur við Sosialin, at teir ein av fyrstu døgunum fara at senda skránna út. Teir hava eisini júst lýst við ráðstevnuni í stóra altjóða oljublaðnum »Uppstream«.

– Eg vóni, at tað fara at møta eini 50 til 100 fólk til ráðstevnuna, sum verður í Norðurlandahúsinum sigur hann. Talan er um jarðfrøðingar, jarðalisfrøðingar og verkfrøðingar og annars fólk við áhuga fyri hesum evninum. Eisini kann hugsast, at lesandi frá hægri lærustovnum fara at luttaka.

Sigurd í Jákupsstovu sigur, at eisini fólk frá Jarðfrøðissavninum fara at hava framløgur, umframt at fleiri kend nøvn úr útheiminum vera við. Evnið er basaltøkið við Føroyar og á Atlantsmótinum og sjálvandi eisini, hvat kann hugsast er undir basaltinum.

Tað kann ikki sigast annað enn, at Jarðfrøðissavnið við hesum tiltakinum hevur rakt seymin á rætta høvdið, tí nettupp spurningurin um balsaltið er hann, sum hevur størstan týdning fyri okkum og tey oljufeløg, sum leita og fara at leita eftir olju og gassi í føroysku undirgrundini. Sigurd í Jákupsstovu dylur so heldur ikki fyri, at eitt av endamálunum við ráðstevnuni er at marknaðarføra Føroyar og økið her, her ikki minst nú vit skulu til at fyrireika eina 2. Útbjóðing. So ráðstevnan má sigast at vera væl »timað«.

Nøkur av evnunum á ráðstevnuni eru hesi: Regional geology, sub-basalt exploration, exploration case histories og prospectivity and future potential.

Vit síggja, at júst hesi evni hava alstóran týdning fyri víðari leitingina, kanningarnar og virksemi á føroyska landgrunninum.




*Herfyri hevði Jarðfrøðissavnið hesa lýsing í altjóða oljublað um ráðstevnuna*

# Statoil tjenti eina milliard um vikuna

**Statoil hevði eina milliard krónur í avlopi um vikuna í fjør**

Ársroknskapurin hjá Statoil fyri 2003, sum varð almannakunngjørdur í gjár, vísti, at felagið hevði 48,9 milliardir norskar krónur í avlopi fyri skatt. Tað var 5,8 milliardir krónur meiri enn í 2002.

Kortini var netoúrslitið heldur lakari í fjør enn í fyrraárið, 16,5 milliardir krónur í fjør ímóti 16,8 milliardum krónum í 2002. Orsøkin er sambært felagnum, at tann amerikanski dollarin var veikari mótvegis norsku krónuni í fjør.

Bæði olju- og gassframleiðslan hjá Statoil var á umleið sama støði í fjør sum í 2002. Harafturímóti var oljuprísurin umleið fimm prosent hægri í fjør, og prísurin á gassi var sjey prosent hægri enn í 2002.

Umsetningurin hjá Statoil var í fjør 249,3 milliardir norskar krónur. Í 2002 var hann 243,8 milliardir.



# Omanlop í Sandslíð

**Um middagsleitið týsdagin leyp grót oman á vegin í Sandslíð á Sandoy**

OMANLOP
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Stutt eftir middag týsdagin var omanlop í Sandslíð á Sandi. Nakrir stórir steinar loysnaðu úr líðini og lupu oman á vegin. Fólkaskaði var eingin, men stórir steinar endaðu á vegnum, og teir forðaðu ferðsluni at ganga frítt.

Menn frá Landsverksfrøðinginum komu tó skjótt á staðið og ruddaðu grótið burtur.

Ingibjørn Eldevig, sýslumaður, sigur, at tað er ikki óvanligt, at lop er eftir kava og frost, um talan ikki altíð er um so stórt grót sum hesaferð.

Á Sandoynni eru fleiri vandamikil strekki, har vandi er fyri omanlopi. Ofta hoyra vit um Dalsvegin. Ingibjørn Eldevig, sýslumaður sigur, tað eisini javnan loypir oman á Skarvanesvegin og í Sandslíð.

– Nú verður so nógv tosað um at vandamiklar vegir og um at gera tunlar. Men tað er einki strekki í landinum so vandamikið sum Sandslíð, heldur sýslumaðurin.

– Her er nógv ferðsla, og her koyra stórir bussar, sigur Ingibjørn Eldevig, sum heldur vegastrekkið í Sandslíð verða hættisligari enn eitt nú gamli Leirvíksvegurin.



*Menn frá Landsverksfrøðinginum komu skjótt á staðið og ruddaðu grótið av vegnum, so ferðslan ótarnað kundi halda fram. Ingibjørn Eldevig, sýslumaður á Sandi heldur, at vegstrekkið í Sandslíð er eitt tað vandamiklasta strekkið í landinum*

*Mynd: Oskar Oskarsson*

# Føroysk KT-loysn til donsk sjúkrahús

**KT-fyritøkan Formula.fo í Havn hevur gjørt avtalu við Storstrøms Amt um at innføra skipanina Patsec á øllum amtinum**

KUNNINGARTØKNI
*Tíðindaskriv*

Í Storstrøms Amt búgva umleið 300.000 fólk, ella seks ferðir fólkatalið í Føroyum. Ein týðandi uppgáva hjá amtunum í Danmark er at reka sjúkrahúsini og 5 sjúkrahús eru í Storstrøms Amt. Hesi koma at nýta føroysku loysnina Patsec, men eisini allir aðrir stovnar í amtinum fara at innføra skipanina.

Patsec er ein standard skipan, sum er ment frá grundini í Føroyum av Formula og fyrrverandi medikotekniska leiðara á Landssjúkrahúsinum Torbein Rein. Skipanin er upprunaliga ætlað medikoteknisku deildunum á sjúkrahúsinum til góðskustýring í sambandi við viðlíkahald av medikotekniskum tólum, men hon er formgivin soleiðis, at hon eisini kann nýtast í sambandi við viðlíkahald av øðrum útbúnaði.

– Ordrin til Storstrøms Amt er eitt frambrot, av tí at hetta er fyrstu ferð vit innføra skipanina til breiðari nýtslu enn til tól og útgerð á sjúkrahúsum. Hetta gevur okkum ein nógv størri og breiðari brúkaraskara og harvið nýggjar møguleikar. Til dømis hava vit gjørt avtalu við ein annan KT-veitara hjá amtinum um samstarv, har vit fáa okkara skipan at samskifta beinleiðis við teirra skipan, sum m.a. grafiskt kann vísa, hvar eitt ávíst tól hjá amtinum stendur. Tað vil siga, at brúkarin á telduni umframt at síggja eina mynd av tólinum kann síggja í hvørjum bygningi, hvørjari deild og í hvørjum rúmi tóli stendur.

Hetta sigur Edvard S. Remberg, sum hevur staðið fyri menningini av Patsec síðan 1999.

Fleiri sjúkrahús, serliga í Danmark, hava keypt og tikið í nýtslu Patsec skipanina, sum hevur stórt virði í dagliga arbeiðinum. Avtalan við Storstrøms Amt er úrslit av miðvísa og støðuga marknaðar- og søluarbeiðinum hjá Formula, serliga mótvegis norðurlendska marknaðinum.



*Edvard S. Remberg, sum hevur staðið fyri menninginum av Patsec síðan 1999 og fleiri av Patsec verkætlanunum. Hann er somuleiðis leiðari av verkætlanini við Storstrøms amt*

# Gávugóðs úr Grunni Thorvalds Poulsen av Steinum

GÁVUGÓÐS
*Tíðindaskriv*

Í morgin, fríggjadagin 13. februar klokkan 10, verður aftur gávugóðs latið úr Grunni Thorvalds Poulsen av Steinum.

Endamálið hjá grunninum er at stuðla og eggja ungum fólki við listarligum hegni til útbúgving.

Thorvald Poulsen av Steinum var gartnari í Havn. Hann hevði stóran áhuga fyri bókmentum og list, og hann stovnaði grunnin, sum ber navn hansara.

Nevndin í grunninum er mannað við rektaranum á Fróðskaparsetrinum, sum formanni, formanninum í LISA og formanninum í Føroya Lærarafelag. Tey eru í løtuni Malan Marnersdóttir, Jenny C. Petersen og Jóhannes Eli Iversen.

Gávuðgóðsið var fyrstu ferð latið í 2001. Tá fekk listakvinnan Rannvá Kunoy 60.000 krónur úr grunninum. Í 2002 fingu 3 listafólk gávu úr grunninum. Trombone spælarin Andrass Olsen fekk 60.000 krónur, filmsleikstjórin Teitur Árnason og rithøvundurin Petur Elias Askham Guttesen fingu hvør sínar 25.000. krónur. Í fjør fekk tónleikarin og tónaskaldið Tróndur Bogason 60.000 krónur.

# Evnisdagur um føroyska ferðavinnu

FERÐAVINNA
*Tíðindaskriv*

Evnið er »økisferðavinna«, og á ársins fyrsta evnisdegi hjá føroysku ferðavinnuni, fara umboð úr øllum kunningarstovum í Føroyum at umrøða støðu og framtíðar útlit hjá føroysku ferðavinnuni.

Evnini fevna eitt nú um fíggjarstøðu, samstarv, menningarmøguleikar, náttúru og umhvørvi, útjaðaraferðavinnu, framtíðar ætlanir og marknaðarføring.

FNU fer at viðgera týdningin av burðardyggari menning í ferðavinnu og Heri Niclasen, stjóri á Ferðaráð Føroya, hevur somuleiðis eina framløgu grundað á innkomin uppskot frá síðsta evnisdegi. Nógv uppskot eru innkomin, og hesaferð eru evnini bygnaður, hagtøl, príspolitikkur og stuðulsmøguleikar til viðgerðar.

Annað umrøðuevnið er altjóða verkætlanin »Destination Viking, Sagas & Storytelling« og innlendismenning sum heild. Framløgufólk eru Birita Nolsø frá Ferðaráðnum og Regin Debess frá Føroya Fornminnissavni.

Evnisdagurin, sum ikki er almennur, verður fríggjadagin 20. februar í Norðurlandahúsinum. Nærri kunning fæst við at venda sær til kunningarstovurnar kring landið ella til Ferðaráð Føroya.